# Eitt hav av list á ólavsøku

**Fjølbroytt myndlist og søguligar framsýningar av ymiskum slagi áttu eisini í ár sín part av skránni fyri ólavsøkuna. Onkur av hesum framsýningum læt upp longu tíðliga í vikuni og heldur fram nakað út um sjálva ólavsøkuna**

LIST
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tann mest umrødda framsýningin hevur vanliga verið ólavsøkuframsýningin hjá Listafelag Føroya, sum í ár læt upp í Listaskálanum, mikudagin 28. juli. Hetta er ein framsýning við úrvælslist, har valt og vrakað verður millum listaverk. Í ár høvdu 39 listafólk tilsamans 131 verk við á framsýningini.

Fyrstu ferð, skipað varð fyri ólavsøkuframsýning, var í 1948 og hevur framsýningin verið á hvørjum ári við undantaki av nøkrum heilt fáum árum.

Tey, sum hava áhuga fyri list, høvdu fleiri møguleikar at velja ímillum á ólavsøku í ár.

Í Norðurlandahúsinum var summarframsýning, sum hesaferð hevði verk hjá seks listafólkum.

Í Mullers Pakkhúsi hevði Lions Club í Havn framsýning, og uppi á loftinum í Smiðjuni í Lítluvík var framsýning við frálíkum skemtitekningum hjá Óla Petersen.

Av øðrum søguligum framsýningum um ólavsøkuna, hevði Føroya Náttúrugripasavn eina framsýning um upphav Føroya, og Føroya Fornminnissavn hevði eina framsýning um veiði úr felags havi við denti á norðsjóvarfiskiskapin árini 1870-1940.

Klædnahandlarnir, Sirri og Snældan, ið selja vælumtókt føroysk pløgg, høvdu eisini opið um ólavsøkuna.

Í hølunum við Tinghúsvegin hevði Losjan framsýning av eitt nú fiskabúrum og fiskum, sum liva í feskum vatni og saltvatni. Losjan sýndi eisini ymisk handverk og list, og fiskibrunnur var til børnini.

## Gamalt og nýtt

Í Smiðjuni í Lítluvík hevði Tórshavnar Býarsavn og Føroya Landsskjalasavn eisini framsýning, sum lýsti býarmenningina árini 1856-1954.



*Ógvusligar andlitsmyndir í Listaskálanum*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Einki stendur í stað, heldur ikki myndlistin*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Ymiskar instalatiónir er partur av nútíðar list*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Myndarøð við naknum manni í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Ungu listafólkini ganga nýggjar leiðir

**– Tey ungu listafólkini hefta seg ikki so nógv við landslagið. Hættirnir broytast, og ein partur av listini byggir meira á instalatiónir, sigur Eyðun av Reyni, listamaður**

LIST
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjamorgunin ringdi Sosialurin til trý kend listafólk fyri at fregnast eftir, um tey høvdu sæð onkra av listaframsýningunum á ólavsøku.

Tann eini hevði av ymiskum orsøkum ikki verið á ólavsøku, meðan hini bæði listafólkini vóru ikki komin so langt á ólavsøku, at tey høvdu sæð nakra av framsýningunum.

Vit vendu okkum tískil til Eyðun av Reyni, sum hevði fýra málningar við á ólavsøkuframsýningini í Listaskálanum.

Eyðun var fyrstu ferð við á eini ólavsøkuframsýning í 1964.

## Listin broytist

Vit spurdu hann, hvat honum dámdi úrvalið á framsýningini í Listaskálanum hesaferð:

– Ja, hvat skal man siga? Tað veldst í fyrsta lagi um eyguni sum síggja.

Eyðun vísir á, at við listini er tað sum við so mongum øðrum, ið skapt verður av mannahondum í skiftandi tíðum.

– Einki stendur í stað. Alt broytist, eisini listin.

Vit skilja á listamanninum, at hann hevur ikki hug í knappari vending at gera sær nakra endaliga niðurstøðu av listini á ólavsøkuframsýningini í ár.

– Tey ungu listafólkini ganga aðrar vegir. Tey hefta seg ikki so nógv við landslagið. Hættirnir broytast, og ein partur av listini byggir meira á instalatiónir.

Eyðun heldur tó ikki, at listin er vorðin meira abstrakt, men tað er meira hugskotini sum broytast.

– Eg haldi, at listin var meira abstrakt ella hálvabstrakt fyri nøkrum árum síðan, sigur Eyðun av Reyni, sum heldur ikki kom longur enn at síggja ólavsøkuframsýningina í Listaskálanum.

## Øssur Mohr

Vit kunnu leggja aftrat, at 6. august letur listamaðurin, Øssur Mohr í Fuglafirði listaframsýning upp í Listaskálanum. Við á framsýningini, sum varar til, 12. september, hevur hann eini 40 listaverk.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hensiu Einarsson fyristøðufólk á Tjarnargarði

Tórshavnar kommuna hevur sett Hensiu Einarsson sum fyristøðufólk á Tjarnargarði frá 1. september 2004.

Hensia er 53 ára gomul og hevur útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur í 1981 á Sjúkrasystraskúla Føroya. Í 1988 tók hon eitt ára diplomútbúgving við sergrein í leiðslu frá Danmarks Sygeplejerskehøjskole ved Aarhus Universitet.

Hon hevur hollar leiðsluroyndir sum økisleiðari innan heimarøktina, og í út við trý ár starvaðist hon sum deildarsjúkrasystir í 10 ár á psykiatrisku deild, eitt nú á gerontopsykiatrisku deild. Eisini hevur hon verið avloysari fyri fyristøðukvinnuna á Landssjúkrahúsinum í 8 mánaðir, og hevur fýra tey seinastu árini starvast sum ábyrgdarhavandi sjúkrarøktarfrøðingur (trissa) á Landssjúkrahúsinum. Hensia hevur einsin starvsroyndir frá arbeiði á røktarheimum í Noreg og á sjukrahúsi í Danmark.



## Andlát

21. juli
Valdemar Djurhuus, bús í Havn, ættaður úr Sumba, 86 ár
22. juli
Marin Elisabeth Zachariassen, vanliga nevnd Marin á Sondum, á Sandi, 73 ár
Joen Hendrik Oliver Sune Petersen, búsitandi í Keypmannahavn, ættaður úr Klaksvík, 71 ár.

24. juli
Frida Joensen í Búðunum, Klaksvík, 87 ár
Sigurlina Samuelsen, vanliga nevnd Lóa, 85 ár.

26. juli
Petur Andre Norðgerð, Leirvík, 41 ár.
Anna Jacobsen, fødd Abrahamsen, ættað av Eiði, búsitandi í Augustenborg, 74 ár.
Elisabeth Thomsen, Tórshavn, 93 ár.

27. juli
Hedvig Rein, 87 ár.

## 80 ára føðingardagur

Mánadagin 2. august verður Sema Kristiansen, Leirvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum sunnudagin 1. august kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Gullbrúdleyp

Í dag, 31. juli, hava Hjørdis og Arne Højgaard á Toftum gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið eru vælkomin í heimið millum kl. 9.00-14.00.

## Brúdleyp

Í dag, 31. juli, kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Karina Nattestad og Øssur Skeel Nolsøe. Veitslan verður fyri innboðin í HB-húsinum kl. 19.30.

Í dag, 31. juli, kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Jóhanna Gunnlaugsdóttir, Vestmanna, og Anders Christiansen, Fredericia. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Vestmanna kl. 19.00.

Í dag, 31. juli, kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Julianna M. Askham, Hvannasund, og Silas K. K. Olofson, Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum í Skálanum og vælkomst verður klokkan 21.00.

## Dagurin

**31. juli. Germanus**, deyður í umleið 448. Føddur í Auxerre í Fraklandi. Var løgfrøðingur og fekk høgt starv sum embætismaður, men varð 40 ára gamal ímóti vilja sínum valdur til biskup í Auxerre. Hann doyði í Ravenna í Italiu.

**August** hevur navn sítt eftir rómverska keisaranum Augustusi. Tá ið teir høvdu gjørt av, at fimti mánaður í gamla rómverska kalendaranum, *quintilis*, skuldi hava navnið juli til minnis um Julius Caesar, hildu teir seinni, at Augustus átti at fáa sama heiðurin sum Julius, og sætti mánaður, sextilis, fekk navnið august.

**1. august. Pætur í fongsli.** Dagurin var á latíni róptur *vincula Petri* (fjøtur Pæturs) og varð hildin til minnis um, at ein eingil kom til hansara í fangarúminum, sló leinkjurnar av honum og bað hann fylgja sær út úr fongslinum. (Ápostlasøgan 13, 3–23).

**2. august. Hannibal**. Teir vita einki halgimenni við hesum navni. Dagurin hevur havt nógv onnur nøvn, men frá árinum 1700 er Hannibal komin upp í halgimannatalið.

Navnið er fønikiskt og merkir *náðigáva Baals*. Best kendi Hannibal í søguni var tann tiltikni herhøvdingin úr Kartago.

*Jóannes Patursson doyði hendan dagin í 1946.*

## Føðingar

21. juli fingu Daisy N. Elttør og Sámal Jóhan Høgnesen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3600 gr.

21. juli fingu Elsebeth og Johannes Pauli V. Mohr, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 4100 gr.

22. juli fingu Jóhanna Feilberg og Arnfríður Jacobsen eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4050 gr.

23. juli fingu Ann Maria og Vinjard Johansen, Eiði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

23. juli fingu Heidi Kilgour og Dennis Holm, Vági, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 5550 gr.

24. juli fingu Jensia Højgaard Kjærbæk og Leon S. Kjærbæk, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4245 gr.

25. juli fingu Arina Bischoff og Høgni H. Debes, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4310 gr.

25. juli fingu Sólrun Jørgensen, Miðvági, og Uni Hansen, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4050 gr.

25. juli fingu Unn Bjarnadóttir og Annfinn Joensen, Sørvági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3425 gr.

25. juli fingu Katrina og Hjalmar Hansen, Rituvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3725 gr.

26. juli fingu Ewald og Mirjam Kjølbro, Vatnsoyrar, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

26. juli fingu Guðrún Bjarnadóttir, Søldarfirði, og Hallur Bech, Porkeri, ein son. Hann var 62 cm langur og vigaði 5720 gr.

26. juli fingu Ingun og Birni Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

27. juli fingu Rannvá Jensen og Kristian Oskar Henriksen, Sandi, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4300 gr.

28. juli fingu Sonja Tungá og Jónsvein Thomsen, Sandi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

29. juli fingu Ada Kristina Petersen og Johan Falkvard Clementsen, Sandi, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2695 gr.

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, abbi og langabbi

**Eivind Eliassen**
**Mikladalur**

doyði og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið. Eisini takka vit øllum, sum við blómum, kransum, telefonsamrøðum og við gávum til Mikladals kirkju vildu minnast hann.

*Fyri tey avvarðandi*
**Kirstin,**
**Mathilda, Eyðun og Magnus**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Anna Elisabeth Thomsen**
Tórshavn

andaðist á Lágargarði 26. juli, 93 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju í dag, leygardagin 31. juli kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Jákup, Tummas Pauli, Margreta og Matilda**

Tey, ið vilja minnast Lisabeth við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Lágargarð, kt. nr. 655.821.8 í Føroya Sparikassa